# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 66/2025: Uppskot til løgtingslóg um fyrireiking, prosjektering og útboð av Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum**

Løgmaður, Aksel V. Johannesen, hevur lagt málið fram 11. desember 2025, og eftir 1. viðgerð 15. desember 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6., 12., 14. og 22. januar og 5., 9. og 12. februar 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Sands kommunu, tunnilsáhugabólkin, Hvalbiar kommunu, Jóhannes Liasson Rasmussen, Húsavíkar kommunu, Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag, Hagafelagið, Føroya Sílaveiðifelag, Veltuna, Føroya Fuglafrøðifelag, Silas Olofsson, Skúvoyar kommunu, Landsbankan, Búskaparráðið, landsstýriskvinnuna í uttanríkis- og mentamálum, Sirið Stenberg, saman við ávikavist Umhvørvisstovuni og Tjóðsavninum, landsstýrismannin í tilfeingis- og vinnumálum, Eirik í Jákupsstovu, saman við Jarðfeingi, landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við ávikavist Landsverki og TAKS og løgmann, Aksel V. Johannesen, saman við ávikavist serfrøðingabólkinum og P/F Suðuroyartunlinum við ráðgevum teirra.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

**Meirilutin** (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Dennis Holm og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

<u>Endamálið við uppskotinum</u>

Í útvið trý ár hevur P/F Suðuroyartunnilin saman við landsstýrinum arbeitt við fyrireikingum av Suðuroyartunlinum. Hetta lógaruppskotið er ein liður í tí arbeiðinum, og snýr uppskotið seg um at geva heimild til P/F Suðuroyartunnilin at fyrireika, prosjektera og bjóða út Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum, soleiðis at størsti parturin av kostnaðinum verður kendur. Tá kostnaðurin er kendur, fær Løgtingið seinni møguleika at taka støðu til málið um Suðuroyartunnilin.

<u>Einar savnaðar Føroyar</u>

Við Suðuroyartunlinum verður Suðuroyggin knýtt upp í restina av Føroyum, og 99% av føroya fólki eru tá bundin í eitt og sama vegakervi og kunnu koyra runt landið í túnið hvør hjá øðrum.

Suðuroyartunnilin er eitt framhald av útbyggingunum av føroyska infrakervinum við undirsjóvartunlum, sum hava knýtt alsamt størri partar av landinum saman. Fyrst Vágatunlinum í 2002, Norðoyatunlinum í 2006, og síðani Eysturoyartunlinum í 2020 og Sandoyartunlinum í 2023.

Hetta hevur eisini ført við sær, at økini eru knýtt saman í ein og sama arbeiðsmarknað, sum eisini hevur givið javnbjóðis møguleikar fyri vøkstri í økinum – og vøksturin hevur eisini verið sjónligur í øllum økjunum, so hvørt sum undirsjóvartunlarnir eru tiknir í nýtslu.

Gongdin í Suðuroynni hevur hinvegin verið skeiva vegin í nógv ár, og Suðuroyggin hevur ikki fingið lut í góðu gongdini í samfelagnum seinastu 10-15 árini. Breið politisk semja er millum flokkarnar á Løgtingi um, at tíðin er búgvin til at taka eitt týðandi stig at fremja Suðuroyartunnilin fyri eisini at venda gongdini í Suðuroynni, eins og gongdin í Sandoynni er vend, eftir at Sandoyartunnilin læt upp fyri ferðslu fyri góðum tveimum árum síðani.

<u>Um uppskotið</u>

Síðan á vári í 2023 hevur verið arbeitt við fyrireikingum av lógaruppskoti, sum skal geva P/F Suðuroyartunlinum heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út ein Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

Hetta uppskotið, løgtingsmál nr. 66/2025, sum varð lagt fram 11. desember 2025, er líkt uppskotinum í løgtingsmáli nr. 72/2024, sum varð viðgjørt í Løgtinginum á vári í 2025, og sum við 3. viðgerð í mai 2025 varð atkvøtt aftur í nevnd.

Eftir 3. viðgerð av løgtingsmáli nr. 72/2024 varð semja gjørd millum løgmann og flokkarnar á Løgtingi um at biðja P/F Suðuroyartunnilin lýsa loysnina við linjuføring norðan fyri Múlan, vestanfyri Sandsvatn, og lýsa hvussu byggipláss og havnarlag kann skipast í Skúgvi, tí hendan linjuføringin leggur upp til, at borast skal úr Skúvoynni.

Eisini varð P/F Suðuroyartunnilin biðin um at gera kostnaðarmetingar av hesum loysnum og at fáa 3. part at eftirkanna bæði loysnirnar við linjuføring úr Djúpadali og norðan fyri Múlan.

Semja var eisini millum flokkarnar um, at P/F Suðuroyartunnilin skuldi framleiða eitt avgerðarnotat, sum fevnir um lýsing og samanbering av tveimum farleiðum, sum knýta Suðuroynna upp í meginøkið. Og tá tilfarið var tøkt, skuldi politisk støða takast til notatið, sum eisini er tøkt sum fylgiskjal 27 í málinum.

Avgerðarnotatið frá P/F Suðuroyartunlinum varð lagt fram fyri flokkunum 20. oktober 2025. Løgmaður hevur til hoyringina í Fíggjarnevndini greitt frá, at flokkarnir síðani fingu høvið at viðgera avgerðarnotatið og venda aftur til løgmann. Tá flokkarnir høvdu svarað løgmanni, var greitt, at breið undirtøka var fyri linjuføring úr Sandvík í Suðuroynni til Djúpadals í Sandoynni, við atkomutunli upp til Skúvoyar.

Hendan linjuføringin er eisini við í hesum uppskotinum, sum eisini fevnir um vegagerð í Sandvík, nýggjan Sandvíkartunnil og vegagerð í Hvalba, soleiðis at vegaføringin frá Suðuroyartunlinum verður knýtt í landsveganetið í Suðuroynni.

Uppskotið fevnir eisini um vegagerð í Djúpadali, tunnil gjøgnum Traðarhamar og vegagerð frá tunlinum eystanfyri Sandsvatn við íbinding til landsvegin í Traðardali. Hesin parturin av uppskotinum er tillagaður, eftir at uppskotið hevur verið til hoyringar.

Linjuføring

Uppskotið fevnir sum nevnt um ein undirsjóvartunnil úr Sandvík til Djúpadals, har tað verður boraður ein tunnil upp í Skúvoynna.

Suðuroyartunnilin er umleið 22,8 km langur við tveimum koyribreytum. Størsta hall er 5% og mesta dýpið er 180 metrar. Lagt er í uppskotinum upp til, at verkætlanin verður boðin út við bæði tunnilsstødd T9,5 og tunnilsstødd T10,5, og hesum tekur meirilutin undir við.

Tunnilin upp til Skúvoyar er 1,5 km langur, tunnilsstøddin er T8,5, og hallið í tunlinum er umleið 10%. Í uppskotinum verður mælt til, at atkoman til Skúvoyar ikki verður frí ella óavmarkað, men avmarkað og stýrd í greiðari skipan. Hesum tekur meirilutin undir við, men mælir eisini til, at tað verður minkað um hallið í tunlinum upp til Skúvoyar.

Til hoyringina greiddu Norconsult, Eivind Grøv, professari og ráðgevi hjá Sintef, og Kasper Nordmelan, sivilverkfrøðingur, frá, at talan var um longsta undirsjóvartunnil í heiminum, og tað í sær sjálvum legði upp til, at stytsta leið varð vald. Norconsult greiddi frá, at tað tó eru dømir um, at jarðfrøðin kann hava ávirkan á, um tað ber til at velja stytstu leið, og at tað eru dømir um tað í Norra, men í hesum førinum talar jarðfrøðin, sambært Eivind Grøv, professara, eisini fyri at gera linjuføring úr Sandvík til Djúpadals. Fíggjarligi parturin og trygd undir arbeiði og skipan av trygd, tá tunnilin er liðugur, talar eisini fyri at velja stytstu leið, varð greitt frá til hoyringina.

Strategiska umhvørvisárinsmetingin viðger eisini alternativu linjuføringina og ávirkan á náttúru og umhvørvi. Niðurstøðan í strategisku umhvørvisárinsmetingini er, at mett verður, at ein linjuføring í Djúpadali við tunli gjøgnum Traðarhamar, og við tunli upp í Skúvoynna er tann, sum hevur minst ávirkan á náttúru og umhvørvi.

Vegaføringar og tunlar á landi

Umframt undirsjóvartunnil úr Sandvík til Djúpadals við atkomutunli til Skúvoyar, fevnir uppskotið eisini um vegagerð í Sandvík, nýggjan Sandvíkartunnil og vegagerð í Hvalba, soleiðis at vegaføringin frá Suðuroyartunlinum verður knýtt í landsveganetið í Suðuroynni.

Í mun til undanfarna uppskot (LM-072/2024), so eru nakrar smærri tillagingar í vegaføringini í Hvalba. Í hoyringini vísti Hvalbiar kommuna á, at tað er av týdningi, at vegirnir verða so væl frágingnir sum gjørligt, bæði tá ið talan er um staðseting í lendinum, ljóðtálman og atkomu til bæði eiðini í Hvalba, umframt økið vestantil í Sandvík. Eisini ynskti Hvalbiar kommuna fleiri frákoyringar í Hvalba í mun til verandi uppskot. Hvalbiar kommuna vísti eisini á, at tað er sera týdningarmikið, at vegaloysnir ikki gera seg inná ella órógva grannaløg. Hesum tekur meirilutin undir við og mælir til, at vegaloysnirnar í Sandvík og Hvalba verða skipaðar í samstarvi við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni og Hvalbiar kommunu.

Uppskotið fevnir eisini um vegagerð úr Djúpadali til Líðarenda, og tunnil gjøgnum Traðarhamar og vegagerð frá tunlinum eystanfyri Sandsvatn við íbinding til landsvegin í Traðardali. Hesin parturin við tunli gjøgnum Traðarhamar er tillagaður, eftir at uppskotið hevur verið til hoyringar.

Til hoyringina vísti Umhvørvisstovan á, at tað var ynskiligt, at Umhvørvisstovan var partur av viðgerðini, tá vegaføringin úr Djúpadali til tunnilin gjøgnum Traðarhamar varð skipað og ynskti

eisini at fáa hetta við í lógina. Hesum tekur meirilutin undir við og mælir til, at vegaføring úr Djúpadali verður skipað í samstarvi við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni, og tunnilin gjøgnum Traðarhamar og vegaføring frá tunlinum verður skipað í samstarvi við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni og Sands kommunu.

Strategiska umhvørvisárinsmetingin mælir til, at vegaføringin í Djúpadali verður tillagað, soleiðis at vegurin frá Suðuroyartunlinum verður lagdur niðan ímóti Lítlavatni og síðani íbundin landsvegin við Líðarenda. William Simonsen og Olivia Danielsen, lívfrøðingar, sum hava gjørt strategisku umhvørvisárinsmetingina, greiddu til hoyringina frá, at hetta fór at føra við sær, at ávirkanin á Stóravatn og vátlendið við Stóravatn bleiv sum minst. Meirilutin tekur undir við, at skipanin av vegaføringini í Djúpadali verður gjørd í tøttum samstarvi við umhvørvismyndugleikarnar, soleiðis at umhvørvis- og náttúruárinini verða sum minst.

Til hoyringina í Fíggjarnevndini vísti Sands kommuna á, at um hildið verður fast í linjuføringini í Djúpadali, so tók kommunan væl ímóti, at vegaføringin varð broytt, soleiðis at tað ikki varð farið gjøgnum Sandafløttin og bygdina, sum lagt varð upp til í uppskotinum, sum var sent til hoyringar.

Sands kommuna vísti til hoyringina á, at tað var ynskiligt, at tunnilin gjøgnum Traðarhamar var longdur, soleiðis at hann kom so langt norður ímóti endanum av Sandsvatni, sum tilber. Eisini vísti kommunan til hoyringina á, at tað var ynskiligt, at vegagerðin frá tunlinum gjøgnum Traðarhamar ikki ávirkaði ítróttarøkið og økið við Meginskúlan á Sandi. Strategiska umhvørvisárinsmetingin viðger somu viðurskifti og mælir til, at vegagerðin eystanfyri Sandsvatn frá tunlinum gjøgnum Traðarhamar verður so langt frá vatninum sum tilber. Meirilutin er á einum máli um, at hetta eigur at verða tikið við í viðgerðina, tá projekteringin av tunlinum gjøgnum Traðarhamar og vegaføring til landsvegin í Traðardali verður skipað.

Til hoyringina vísti Sands kommuna á, at tunnilin gjøgnum Traðarhamar fór eisini at verða ein góð loysn fyri eystanbygdirnar. Sands kommuna vísti til hoyringina á, at hetta eisini fór at loysa avbjóðingina við tungari ferðslu gjøgnum Sandafløttin til og frá nýggju smoltstøðini í Skálavík. Í hesum sambandi vísti Sands kommuna á, at rættast er at gera tunnilin gjøgnum Traðarhamar lidnan, áðrenn farið verður undir at bora Suðuroyartunnilin í Djúpadali, soleiðis at tunga ferðslan frá Suðuroyartunlinum kann brúka farleiðina gjøgnum Traðarhamar. Meirilutin er samdur í, at loysnin við tunli gjøgnum Traðarhamar eisini er ein góð loysn, sum dagførir farleiðina til eystanbygdirnar, ein ætlan, sum hevur verið á skrá í nógv ár.

<u>Jarðfrøðin</u>

Í viðgerðini av LM-072/2024 í fjør greiddi Jarðfeingi frá, at onki var í jarðfrøðiligu kanningunum, sum bendi á, at ein undirsjóvartunnil ikki kann gerast millum Suðuroynna og Sandoynna. Greitt varð frá, at sjálv frágreiðingin av jarðfrøðiligu kanningunum var ikki liðug, men at hon fór at verða liðug seinni í 2025.

Tá hetta lógaruppskotið, LM-066/2025, varð borið í Løgtingið í desember 2025, var jarðfrøðiliga frágreiðingin eisini við sum fylgiskjal 38.

Jarðfeingi greiddi til hoyringina frá øllum kanningunum, sum eru gjørdar í samband við fyrireikingarnar av Suðuroyartunlinum. Talan er um drúgt og víttfevnandi kanningararbeiði av

jarðfrøðini í samband við Suðuroyartunnilin. Greitt varð eisini frá, at tað eru gjørdar nógv fleiri kanningar í samband við Suðuroyartunnilin, enn tað vóru við undanfarnu undirsjóvartunlum.

Jarðfeingi greiddi til hoyringina frá, at kanningarnar vístu ein fald tætt undir landi í Skarvanesi, sum fer norður undir Sandoynna, sum Suðuroyartunnilin fer ígjøgnum tríggjar ferðir, tá borað verður úr Djúpadali. Til hoyringina greiddi Jarðfeingi frá, at hetta ikki hevði ávirkan á, um Suðuroyartunnilin kundi gerast við linjuføring úr Djúpadali til Sandvíkar.

Eivind Grøv, professari og ráðgevi hjá Sintef, greiddi til hoyringina eisini frá faldinum, sum gongur framvið Skarvaneslandinum, norður gjøgnum Sandsvág og síðani undir Sandoynni. Greitt varð frá, at tá borað varð gjøgnum slík *geologisk fænomen*, sum professarin málbar seg, so var best at raka beint á faldin, so farið verður gjøgnum faldin, heldur enn at raka inn á faldin síðulens, tí tá kann man enda í einari støðu, har tað verður borað leingi í gjøgnum faldin. Greitt varð til hoyringina frá, at hetta seinna er galdandi fyri alternativu linjuføringina vestanfyri Sandsvatn, tó at tað ikki neyðturviliga fór at verða ein trupulleiki.

Jarðfeingi greiddi til hoyringina frá, at tað eisini varð borað gjøgnum hendan faldin, tá Sandoyartunnilin varð boraður, men tá visti man ikki so nógv um faldin. Tað veit man nú, eftir Sandoyartunnilin og eftir, at fleiri jarðfrøðikanningar eru gjørdar í samband við Suðuroyartunnilin. Eivind Grøv greiddi til hoyringina frá, at tá borað varð gjøgnum faldin í Sandoyartunlinum, tá varð eisini borað beint inn á faldin, og at ongir trupulleikar vóru við tí.

Jarðfeingi greiddi til hoyringina frá, at hóast nógv meiri vitan er um faldin nú, so verður mælt til at bora nøkur “jarðhitahol” á Sandi, har faldurin fer upp á land, soleiðis at tey enn betur kunnu skilja jarðfrøðina. Jarðfeingi hevur í skrivligum svari til Fíggjarnevndina greitt frá, at tað tekur umleið 3 mánaðir tilsamans at gera hesar boringar, greina úrslitini og skriva frágreiðing.

Til hoyringina varð spurt um hesar boringarnar skulu gerast, áðrenn hildið verður fram við projekteringini av Suðuroyartunlinum. Til tað svaraði Jarðfeingi, at tað var ikki óvanligt at gera kanningar av hesum slag, meðan man projekterar; tað varð gjørt í samband við Eysturoyartunnilin, og kann eisini væl gerast í samband við Suðuroyartunnilin.

Meirilutin er av teirri fatan, at jarðfrøðiligu viðurskiftini eru væl kannaði, og tað eru ikki jarðfrøðilig ivamál, sum elva til at steðga á við projekteringini og útboðnum av Suðuroyartunlinum.

Umhvørvis- og náttúruatlit

Stórar útbyggingar av infrakervinum hava í nógvum førum ávirkan á náttúruna og umhvørvið; tí er tað av størsta týdningi, at neyðug umhvørvis- og náttúruatlit verða tikin, tá farið verður undir stórar verkætlanir sum Suðuroyartunnilin.

Nógv hoyringarskriv vísa á týdningin av at taka atlit til náttúruna og umhvørvið. Til hoyringina vístu Føroya Nátturu- og Umhvørvisfelag, Hagafelagið, Veltan, Føroya Fuglafrøðifelag og Føroya Sílaveiðifelag eisini á týdningin av, at tað í samband við Suðuroyartunnilin og vegaføringar verða tikin atlit til at avmarka avleiðingar á fuglalív, plantulív, lív í áum og løkjum, vøtn, vátlendi, og landbúnaðarjørð.

Í hoyringini vísti Umhvørvisstovan á, at tað vóru nógvir batar í hesum uppskotinum, samanborið við tað fyrra (LM-072/2024), sum var til viðgerðar á vári í 2025, og vístu m.a. til § 8 í lógaruppskotinum, sum er um umhvørvisárinsmeting í samband við Suðuroyartunnilin. Umhvørvisstovan fegnaðist eisini um, at ein strategisk umhvørvisárinsmeting er gjørd, sum varð latin Fíggjarnevndini fyrst í februar 2026 (nevndarskjøl M4-M10).

Til hoyringina greiddi landsstýriskvinnan við umhvørvismálum og Umhvørvisstovan frá, at tey arbeiddu við uppskoti til eitt ískoyti, sum kann fara inn í lógartekstin um umhvørvispartin, har tað verður ásett, at vegaføringar skulu leggjast í samráð við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni. Hetta ískoytið er síðani sent nevndini, og meirilutin tekur undir við hesari broyting í lógaruppskotinum.

Umhvørvisstovan greiddi til hoyringina frá, at tey hildu tað hava stóran týdning, tá verkætlanir sum Suðuroyartunnilin verða gjørdar, at verkætlanin verður gjørd so skynsom sum tilber fyri umhvørvið og náttúruna. Hesum er meirilutin samdur í.

Til hoyringina í Fíggjarnevndini greiddu William Simonsen og Olivia Danielsen, lívfrøðingar, frá strategisku umhvørvisárinsmetingini. Tey bæði hava síðani 2007 gjørt strategiskar árinsmetingar í Føroyum. Greitt varð frá, at hetta var fyrsta strategiska umhvørvisárinsmeting, sum varð gjørd í Føroyum, og at leisturin er gjørdur út frá mannagongdum hjá Umhvørvisstovuni.

Greitt varð til hoyringina frá niðurstøðuni í strategisku umhvørvisárinsmetingini, har mett verður, at ein linjuføring í Djúpadali við tunli gjøgnum Traðarhamar og við tunli upp í Skúvoynna er tann, sum hevur minst ávirkan á náttúru og umhvørvi.

Mælt varð til:

- Viðv. vegaføringini eystanfyri Sandsvatn at gera eina farleið, ið liggur longri burtur frá vatninum enn núverandi leið við uppskotinum um tunnil gjøgnum Traðarhamar og vegaføring inn í Traðardal.

- Viðv. vegaføringini í Djúpadali at flyta íbindingina frá Stóravatni til økið norður-eystan fyri Lítlavatn.

Greitt varð til hoyringina frá, at hesar broytingar føra við sær, at Stóravatn, Sandsvatn, Gróthúsvatn, Nykutjørn og vátøki verða ávirkaði sum minst. Harumframt fer hendan loysnin eisini at hava minni árin á umhvørvið í Skúvoynni, enn um borað verður niður úr Skúgvi.

Meirilutin er á einum máli um, at tað hevur stóran týdning, at atlit verða tikin til náttúru og umhvørvi í øllum verkætlanum landsins, bæði tá talan er um vegagerð, tunlar, havnir og bygningar – soleiðis eisini við Suðuroyartunlinum og tilhoyrandi vegaføringum og tunlum.

<u>Grót</u>

Spurningurin um grót og gagnnýtslu av grótinum úr Suðuroyartunlinum varð eisini viðgjørdur ísbv. LM-072/2024. Í viðgerðini av LM-072/2024 greiddi P/F Suðuroyartunnilin frá, at kommunurnar í Suðuroynni eru sinnaðar av taka alt grótið. Í Sandoynni er eisini ávísur áhugi hjá kommunum, men talan var um avmarkaðar nøgdir.

Húsavíkar kommuna vísti til hoyringina í januar á, at tey hildu tað verða ein góður møguleiki, um vegur varð gjørdur við Klivarnar (við Skarvanes) og grótið lagt har nærhendis. Frástøðan frá tunnilsmunnanum í Djúpadali til Klivarnar er umleið 1.200 m og hevði hetta givið møguleika fyri einum stórum byggibúnum øki við Skarvanes. P/F Suðuroyartunnilin greiddi frá, at felagið hevði gott samskifti við kommunurnar, eisini um nýtslu av gróti, og at felagið eisini fór at taka hetta upp við kommunur í Sandoynni og í Suðuroynni, tá linjuføringin er samtykt í Løgtinginum.

Umhvørvisstovan vísti til hoyringina á, at tað hevur týdning, at tað verða funnar góðar loysnir fyri grótið, áðrenn farið verður í gongd við Suðuroyartunnilin. Meirilutin er eisini á einum máli um, at tað hevur týdning at finna góðar loysnir fyri gagnnýtsluna av grótinum úr Suðuroyartunlinum, eins væl og úr nýggja Sandvíkartunlinum og tunlinum gjøgnum Traðarhamar.

<u>Trygd undir arbeiði og tá tunnilin letur upp</u>

Spurningurin um trygd undir arbeiðinum og tá Suðuroyartunnilin letur upp fyri ferðslu fekk drúgva viðgerð, tá LM-072/2024 varð viðgjørt í vár, og vísir meirilutin til álitið í LM-072/2024 ísbv. trygd undir arbeiði, og tá tunnilin letur upp.

Spurningurin um trygd varð tó eisini viðgjørdur, tá Norconsult var til hoyring í nevndini.

Greitt varð til hoyringina frá, at størsti vandin í einum langum tunli er samanstoytur og koyring útav koyribreytini inn í tunnilsveggin, og eldur í stórum akførum ella í ferðafólkabussum við nógvum ferðandi.

Trygdarleiðarin hjá Norconsult greiddi frá, at Suðuroyartunnilin varð gjørdur í samsvari við norsku Håndbok N500 vegtunneler og Tunnelssikkerhetsforskriften. Greitt varð eisini til hoyringina frá, at tað í mun til N500 og Tunnelssikkerhetsforskriften mátti søkjast um fýra frávik:

- Longdin á Suðuroyartunlinum, tí N500 ikki fevnir um tunlar, sum eru so langir, sum Suðuroyartunnilin.
    - Í tí sambandi varð eisini til hoyringina greitt frá skipan við trygd í einum so langum tunli sum Suðuroyartunlinum. Greitt varð frá, at loysnir fyri trygd í tunlum fyrst og fremst fevna um, at øll, sum ikki eru beinleiðis partur av einum óhappi inni í tunlinum, sjálvi skulu kunna koyra út, ganga út ella ganga til nærmasta trygdarrúm, um trygdarrúm eru í tunlinum. Tey, sum eru partur av óhappinum, verða, um neyðugt, bjargaði út av brunaliðum / bjargingarfeløgum. Er eldur í, so verður ventilatiónin brúkt til at blása roykin ein veg, meðan fólk í hinum partinum av tunlinum kundu fara út ella í trygdarrúm – og síðani verður ventilatiónin vend og roykurin blástur hin vegin. Í slíkum støðum verða bæði hátalara-anlegg, ljós-skelti og ljós brúkt til at vegleiða fólk um, hvagar tey skulu fara.

- Frávik má eisini søkjast um trygdarrúm, tí trygdarrúm eru ikki í Tunnelssikkerhetsforskriften.
    - Trygdarleiðarin hjá Norconsult greiddi til hoyringina frá, at trygdarrúm eru góðkend í trimum tunlum í Norra, og er talan um tunlar, sum eru dagførdir, ikki nýbygdir.

Hesir tunlar hava fingið trygdarrúm í 2013, 2023 og 2025. Greitt varð eisini til hoyringina frá, at trygdarrúm í Norra hava verið brúkt í samband við eldsbrunar inni í tunlinum.

- Til hoyringina greiddi trygdarleiðarin hjá Norconsult frá, at í Norra má søkjast um frávik til trygdarrúm, tí í Norra eru ES-reglur um trygdarrúm galdandi. ES-reglurnar loyva ikki trygdarrúmum, men frávik kann í Norra gevast frá hesum reglum.

- N500 loyvir ikki krossvegi í tunlinum, tí má eisini søkjast um frávik í samband við frákoyringina til Skúvoyar. Hetta eru somu viðurskifti, sum vóru galdandi í Eysturoyartunlinum, men har kom tað inn í lógina um Eystur- og Sandoyartunnil, at rundkoyring skuldi gerast í Eysturoyartunlinum.

- Tunnilsforskriftin og N500 loyva ikki halli yvir 5%, sum er støðan fyri tunnilin upp til Skúvoyar, tí skal eisini søkjast frávik fyri hesum.

Til hoyringina greiddi trygdarleiðarin hjá Norconsult frá, at hóast Suðuroyartunnilin verður ein langur tunnil, so er talan um ein tunnil við lítlari ferðslu og lutfalsliga lítlari tungari ferðslu. Hetta ger tað lutfalsliga lættari at skipa trygdina, í mun til um talan var um ein langan tunnil við nógvari ferðslu og nógvari tungari ferðslu, sum slíkir langir tunlar ofta hava aðrastaðni.

Spurningurin um váðameting og trygdarætlan varð eisini umrøddur til hoyringina við Norconsult. Serliga spurningurin um, at hetta skal gerast av einum óheftum ráðgeva, eins og Landsverk hevur víst á. Norconsult greiddi til hoyringina frá, at í Norra var vanligt, at sama felag kundi projektera og gera váðameting og trygdarætlan, men at hetta skuldi liggja undir atskildum deildum hjá felagnum. Víst varð eisini til Tunnelsikkerhetsforskriften §10: *Risikoanalyse skal gjennomføres av et organ som er funksjonsmessig uavhengig av tunnelforvalter. Innholdet og resultatene av risikoanalysen skal tas med i sikkerhetsdokumentasjonen som framlegges for Vegdirektoratet*. Hetta varð eisini gjørt í samband við Eystur- og Sandoyartunnilin, har Norconsult projekteraði og gjørdi váðameting og trygdarætlan fyri tunlarnar.

Ein partur av trygdini fevnir um tilbúgving í nærumhvørvinum. Húsavíkar kommuna greiddi til hoyringina frá, at kommunan arbeiðir við at gera samstarvsavtalu við Tórshavnar kommunu, og hendan avtalan er um at vera klár. Hvalbiar kommuna greiddi til hoyringina frá, at kommunan hevur samstarv við Tvøroyrar kommunu um tilbúgving.

Meirilutin er samdur um, at trygdin undir arbeiði, og tá tunnilin letur upp fyri ferðslu, eigur at hava hægstu raðfesting.

<u>Fíggjarligi parturin</u>

Endamálið við hesum uppskotinum er, sum nevnt, at geva heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum, soleiðis at størsti parturin av kostnaðinum verður kendur.

Hetta lógaruppskotið gevur sostatt ikki heimild til at fara undir sjálvan Suðuroyartunnilin og upptaka lán til Suðuroyartunnilin. Tann spurningin skal Løgtingið taka støðu til, tá kostnaðurin er kendur.

Í hesum lógaruppskotinum eru tó gjørdar metingar av, hvat Suðuroyartunnilin og tilhoyrandi verkætlanir væntandi fara at kosta. P/F Suðuroyartunnilin metir, at Suðuroyartunnilin við íbinding til Skúvoynna kostar 4.125 mió. kr. Atknýttar verkætlanir, sum fevna um vegagerð og nýggjan Sandvíkartunnil og vegagerð í Sandoynni og tunnil gjøgnum Traðarhamar, eru mettar at kosta 750 mió. kr. Øll verkætlanin er sostatt mett at kosta umleið 4.875 mió. kr.

Suðuroyartunnilin verður fíggjaður eftir sama leisti sum Eystur- og Sandoyartunlar. Landið setur partapening í felagið við ætlan um at játta 100 mió. kr. um árið í 10 ár. Hetta varð fyrstu ferð gjørt í 2025, og eru eisini 100 mió. kr. settar av til Suðuroyartunnilin á fíggjarlógini fyri 2026. Harumframt kemur Íleggingargrunnurin við rentu- og avdráttarfríum láni á 350 mió. kr. Restin verður fíggjað við lántøku.

Lánini verða afturgoldin við brúkaragjøldum, sum eru mett til 80 mió. kr. við 1.400 akførum um samdøgrið. Harumframt verður kostnaðurin av verandi Suðuroyarleið og Skúvoyarleið fluttur til P/F Suðuroyartunnilin, tá tunnilin letur upp fyri ferðslu - hetta er sama loysn, sum er gjørd við Sandoyarleiðini - og er hetta mett til at verða 160 mió. kr. um árið.

Lánini hjá P/F Suðuroyartunlinum eru afturgoldin 30 ár eftir, at tunnilin letur upp fyri ferðslu.

Fíggjarligi parturin av samlaðu verkætlanini varð umrøddur til hoyringina við Landsbankanum, Búskaparráðnum og Fíggjarmálaráðnum.

Landsbankin vísti í hoyringini á, at eftir teirra fatan, so er tað ikki ráðiligt at fara undir Suðuroyartunnilin nú, uttan at neyðug tiltøk verða framd at fáa fíggjarpolitikkin haldføran. Hetta eru eisini viðurskifti, sum Landsbankin hevur víst á í hoyringarskrivi.

Í umrøðuni av ávirkan á fíggjarlógina vísti Landsbankin til hoyringina á, at eftir teirra útrokningum fór Suðuroyartunnilin at kosta 14 mió. kr. meiri um árið enn verandi siglandi farleið um Suðuroyarfjørð og til Skúvoyar.

Búskaparráðið vísti til hoyringina á, at Suðuroyartunnilin í longdini er ein góð íløga í mun til verandi alternativ, sum ikki er fast samband. Búskaparráðið vísti til hoyringina tó eisini á, at tað hevur týdning at fáa framt átøk fyri at betra um haldførið, áðrenn farið verður undir Suðuroyartunnilin.

Fíggjarmálaráðið vísti eisini til hoyringina á, at tað er neyðugt við átøkum fyri at tryggja langtíðarhaldføri í búskapinum, áðrenn farið verður undir Suðuroyartunnilin, og vísti eisini til uppskotið um broyting í landsins játtanarskipan (LM-070/2025), sum er komið í Løgtingið.

Í hoyringarskrivinum umrøður Fíggjarmálaráðið veðhaldsbindingina mótvegis P/F Eystur- og Sandoyartunlum, sum eigur at vera burtur, áðrenn farið verður undir Suðuroyartunnilin. Hendan veðhaldsskyldan er tongd at ferðsluni gjøgnum Eystur- og Sandoyartunlar. Til hoyringina greiddi Fíggjarmálaráðið frá, at veðhaldsskyldan hjá landinum mótvegis P/F Eystur- og Sandoyartunlum nú er burtur, og verður lániskuldin hjá P/F Eystur- og Sandoyartunlum tí ikki longur at rokna sum partur av skuldini hjá landinum.

Til hoyringina í Fíggjarnevndini varð spurningurin um innskotið í P/F Suðuroyartunnilin eisini umrøddur. Fíggjarmálaráðið vísti á, at rættast er at endurskoða tørvin á innskoti til P/F Suðuroyartunnilin, tá kostnaðurin av Suðuroyartunlinum er kendur.

Jóhannes Liasson Rasmussen, cand.merc.aud, vísti til hoyringina á uppgerð av fíggjarligu ávirkanini, sum Suðuroyartunnilin hevur á fíggjarlógina og landskassan. Víst varð til hoyringina á útrokning, ið eisini liggur sum nevndarskjal í málinum, sum vísir, at Suðuroyartunnilin loysir seg væl, og at um hugt verður at íløguni yvir *lívitíðina hjá tunlinum* t.e. 75 ár, so er talan um eina sparing á umleið 7 milliardir í dagsins virði.

Útrokningin tekur útgangsstøði í metingini hjá P/F Suðuroyartunlinum og harumframt er so lagt upp fyri inflatión og byggirentu í byggitíðarskeiðinum, soleiðis at íløgukostnaðurin verður 5,8 mia. kr. Útrokningin er grundað á eitt samlað lán á 4,45 mia. kr., og vísir ár 1 eitt negativt gjaldførisúrslit á 27,8 mio. kr. Við einum gjaldførishalli, so er framvegis pláss fyri einum avdrátti uppá lánið uppá 52 mió. kr. í ári 1, uttan eyka stuðul úr landskassanum. Gjaldførisúrslitið verður tó betri við inflatiónini, og longu í ári 7 vísir tað eitt avlop. Greitt varð frá, at roknistykkið tekur bara hædd fyri beinleiðis kostnaðum og inntøkum, og ikki óbeinleiðis effektiviseringum, ið kunnu standast av Suðuroyartunlinum, t.d. eini sparing av at leggja ein kaðal gjøgnum ein tunnil heldur ein sjókaðal, sum er mett til 150 mió. kr. í sparingum hjá SEV.

Greitt varð til hoyringina frá, at ein stórur partur av íløgukostnaðinum fór at falla í Føroyum m.a. umvegis skattir og avgjøld, kanska 20% ella meira, meðan hetta t.d. ikki er galdandi, um ein nýggjur Smyril verður bygdur uttanlands.

Meirilutin hevur í viðgerðini víst á, at hetta uppskotið snýr seg um at geva heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum, soleiðis at størsti parturin av kostnaðinum verður kendur. Tá kostnaðurin er kendur, fær Løgtingið seinni møguleika at taka støðu til málið um Suðuroyartunnilin. Sostatt førir hetta uppskotið ikki við sær, at farið verður undir at gera Suðuroyartunnilin, hóast tað í uppskotinum eru gjørdar metingar av kostnaðinum og ávirkanina á fíggjarlógina.

Meirilutin hevur noterað sær, at mælt verður til at gera átøk fyri at tryggja fíggjarpolitiskt haldføri. Meirilutin hevur eisini noterað sær, at útrokningar vísa, at Suðuroyartunnilin loysir seg væl og sum frá líður fer at føra við sær eina munandi sparing fyri landið, samanborið við verandi siglandi farleiðir til Suðuroyar og Skúvoyar.

<u>Alternativ linjuføring</u>

Í viðgerðini í Fíggjarnevndini og til hoyringarnar hevur eisini verið umrøða av alternativu linjuføringini vestanfyri Sandsvatn, og umrøða av spurninginum um at bora atkomutunnilin til Skúvoyar niður úr Skúvoynni.

Í lógaruppskotinum og skjølunum, sum fylgja við uppskotinum, eru hesi viðurskifti eisini viðgjørd; harumframt er eisini gjørd strategisk umhvørvisárinskanning, sum liggur í nevndarskjølunum.

Tunnilsáhugabólkurin, sum hevur uppskot um alternativa linjuføring, greiddi í hoyringini frá uppskoti um linjuføring við tunnilsmunna stutt norðan fyri bygdina á Sandi, í økinum, sum verður nevnt á Ryggi. Hesin tunnilin er 24,8 km langur.

Uppskot teirra fevnir eisini um tunnil til Skúvoyar við einum halli á 6%, sum er minni hall, enn í tunlinum til Skúvoyar í hesum lógaruppskotinum. Orsøkin til hetta er, at við alternativu linjuføringini verður høvuðstunnilin lyftur upp undir Skúvoynna, soleiðis at tað, umframt brekkur upp í Suðuroynni og Sandoynni, eisini verða tvær brekkur upp undir Skúvoynna. Til hoyringina vísti Norconsult á, at tað sum heild verður mælt frá at hava ov nógvar brekkur í einum undirsjóvartunli.

Uppskotið frá áhugabólkinum fevnir eisini um havnargerð og arbeiðspláss í Skúgvi, men tað varð eisini greitt frá til hoyringina, at áhugabólkurin metti tað verða gjørligt at gjøgnumføra alternativu linjuføringina uttan at bora niður úr Skúgvi.

Áhugabólkurin metir, at alternativa linjuføringin er bíligari enn linjuføringin í Djúpadali við atknýttari vegagerð og tunli gjøgnum Traðarhamar. Munurin stendst serliga av, at mett verður, at havnargerðin og arbeiðspláss í Skúgvi kann gerast bíligari enn metingin hjá P/F Suðuroyartunlinum; tunnilin í Traðarhamri er ikki við í uppskotinum; harumframt verður mett, at Suðuroyartunnilin kann gerast skjótari við alternativu linjuføringini, og hetta førir við sær sparingar á Suðuroyarleiðini og Skúvoyarleiðini, og eisini at inntøkurnar frá Suðuroyartunlinum byrja fyrr.

P/F Suðuroyartunnilin vísir hinvegin á, at alternativa linjuføringin er út við 1 mia. kr. dýrari enn linjuføringin til Djúpadals. Kasper Nordmelan, sum gjørdi triðjapartsmetingina, vísti til hoyringina eisini á, at alternativa linjuføringin var út við 1 mia. kr. dýrari enn linjuføringin til Djúpadals.

Kasper Nordmelan vísti til hoyringina á, at tað kunnu verða fyrimunir við at arbeiða niður úr Skúvoynni, bæði galdandi fyri linjuføringina í Djúpadali og alternativu linjuføringina framvið Sandsvatni. Hetta kravdi, at øll loyvi í Skúvoynni vóru uppá pláss so tíðliga sum tilber, og at tað ikki vóru nakrar avmarkingar í, hvussu arbeiðast kundi í Skúgvi. Vóru hesi loyvi ikki fingin uppá pláss, so fór loysnin við at bora úr Skúvoynni ikki at føra við sær sparingar, men eina dýrkan av Suðuroyartunlinum. Kasper Nordmelan vísti til hoyringina á, at hóast øll loyvi vóru fingin til vegar í Skúvoynni, og ongar avmarkingar vóru í, hvussu arbeiðast kundi, so var tað framvegis besta loysnin at hava linjuføring til Djúpadals.

Tá umræður alternativu linjuføringina, so hevur Sands kommuna í hoyringarskrivi (fylgiskjal 65) víst á, at besta loysnin er linjuføringin vestanfyri Sandsvatn, har tunnilin fer niður norðan fyri Múlan. Hetta endurtók kommunan til hoyringina.

Viðvíkjandi uppskotinum um, at Suðuroyartunnilin skal fara niður í økinum norðan fyri Sands bygd, sum verður nevnt á Ryggi, so vísti kommunan til hoyringina á, at møguleikarnir hjá bygdini at vaksa eru avmarkaðir, og nú bygdin stendur í vøkstri, er hetta økið norðan fyri bygdina best hóskandi til bústaðarøki. Kommunan greiddi eisini til hoyringina frá, at tað fór at hava stóra ávirkan á Sands kommunu, um arbeiðspláss til Suðuroyartunnilin fór at verða tætt uppá bygdina, og um ferðslan fór at verða eftir landsvegnum framvið Sandsvatni. Kommunan vísti í tí sambandi eisini á ynski um, at ferðslan til skúlan og ítróttarøkið verður hildin fyri seg, óávirkað av ferðsluni frá tunnilsarbeiðinum.

Spurningurin um alternativu linjuføringina varð eisini umrøddur, tá Jarðfeingi var til hoyring, og greiddi Jarðfeingi frá, at tann linjuføringin ikki er kannað til fulnar. Greitt varð frá, at neyðugt verður við fleiri kanningum á landi, og at tað eisini er neyðugt at gera nærri kanningar av einum

"belti", sum liggur á havbotninum frá Skúvoynni og norður ímóti Sandsbygd; tað kann verða okkurt er har, men vit vita ikki, vísti Jarðfeingi á til hoyringina. Í skrivligum svari til Fíggjarnevndina hevur Jarðfeingi eisini greitt frá, at tað skulu gerast fleiri kanningar á sjógvi og á landi ísbv. alternativu leiðina.

Hesar kanningar fevna um:

1. Á landi er tørvur á, at:

    a. kortleggja jarðfrøðina (feltarbeiði) heima á Sandi, á vestursíðuni av oynni og á Skúvoynni,

    b. gera magnetiskar mátingar somu støð,

    c. og at gera eina kjarnaboring nærhendis tunnilsmunnanum norðan fyri Sands bygd. Kjarnin skal síðan lýsast, umframt at holið skal mátast (loggast).

2. Á sjónum er tørvur á, at:

    a. sigla fram við landi fyri at hyggja at rivum í økjum, har ikki varð siglt í sambandi við Skarvanesleiðina (vestursíðuni av Sandoynni og norður- og vestursíðuni av Skúvoynni),

    b. fylla tey hol, sum eru í multibeam data (dýpdardata) millum Sandoynna og Skúvoynna

    c. og at hyggja nærri at seismiskum og multibeam data millum Sandoynna og Skúvoynna, og alt eftir, hvat tað førir við sær, kann tað verða tørvur á meir data so sum subbottom profiler (sediment skanningar) data.

Jarðfeingi hevur í skrivligum svari til Fíggjarnevndina greitt frá, at tað tekur 4-6 mánaðir at framleiða eina jarðfrøðiliga samlifrágreiðing í stíl við hana, sum er gjørd til Skarvanesleiðina. Víst verður tó eisini á, at óvissur eru í, at innsavnan av nýggjum multibeam data, umframt at neyvari lýsing av verandi data kann vísa á, at tørvur er á at savna onnur sløg av data fyri at fáa nøktandi mynd av jarðfrøðini.

Eivind Grøv greiddi eisini til hoyringina frá, at alternativa linjuføringin fór at fara framvið faldinum, sum gongur útfyri Skarvaneslandinum, norður gjøgnum Sandsvág og undir Sandoynni. Greitt varð eisini frá, at tað kundi føra við sær avbjóðingar, um borað varð framvið faldinum, í mun til tá farið varð beint gjøgnum faldin.

Strategiska umhvørvisárinsmetingin viðger eisini alternativu linjuføringina og ávirkan á náttúru og umhvørvi. Niðurstøðan í strategisku umhvørvisárinsmetingini er, at mett verður, at ein linjuføring í Djúpadali við tunli gjøgnum Traðarhamar, og við tunli upp í Skúvoynna er tann, sum hevur minst ávirkan á náttúru og umhvørvi.

Í strategisku umhvørvisárinsmetingini er tilmæli um:

- Viðv. vegaføringini eystanfyri Sandsvatn verður mælt til at gera eina farleið, ið liggur longri burtur frá vatninum enn núverandi leið við uppskotinum um tunnil gjøgnum Traðarhamar og vegaføring inn í Traðardal.

- Viðv. vegaføringini í Djúpadali at flyta íbindingina frá Stóravatni til økið norður-eystan fyri Lítlavatn.

Greitt varð til hoyringina frá, at hesar broytingar føra við sær, at Stóravatn, Sandsvatn, Gróthúsvatn, Nykutjørn og vátøkir verða ávirkaði sum minst. Harumframt fer hendan loysnin eisini at hava minni árin á umhvørvið í Skúvoynni, enn um borað verður niður úr Skúgvi.

Meirilutin hevur noterað sær, at tað eru óvissur viðvíkjandi alternativu linjuføringini. Jarðfrøðin er ikki kannað til fulnar, og spurningurin er eisini, hvørja ávirkan uppskotið um linjuføring á Ryggi fær á møguleikarnar at útbyggja Sandsbygd, eins og Sands kommuna vísti á til hoyringina.

Meirilutin hevur eisini noterað sær, at bæði Umhvørvisstovan og strategiska umhvørvisárinsmetingin vísa á stóra ávirkan á umhvørvið og náttúruna í Skúgvi, um borað verður niður úr Skúgvi. Strategiska umhvørvisárinsmetingin vísir eisini á, at loysnin við linjuføring í Djúpadali førir við sær, at Stóravatn, Sandsvatn, Gróthúsvatn, Nykutjørn og vátøkir verða ávirkaði sum minst.

<u>Bora úr Skúvoynni og umhvørvis- og náttúruatlit</u>

Í tilfarinum í lógaruppskotinum er spurningurin um havnargerð og arbeiðspláss í Skúgvi umrøddur. Víst verður í tilfarinum á, at hetta dýrkar um samlaðu verkætlanina, men um øll loyvir eru fingin uppá pláss beinanvegin, so kann tað at bora niður úr Skúgvi føra við sær eina sparing í tíð bæði galdandi fyri linjuføringina til Djúpadals og alternativu linjuføringina vestanfyri Sandsvatn.

Bæði P/F Suðuroyartunnilin, Serfrøðingabólkurin - sum løgmaður setti í mai - og áhugabólkurin fyri alternativari linjuføring greiddu í hoyringini frá, hvussu havnargerð og arbeiðspláss í Skúvoynni kundi skipast. Breið semja var um, at talan er um eitt byggipláss, sum samanlagt verður 50-60.000 fermetrar til støddar, sum lutvíst er á landi og lutvíst er á nýggjum havnarlagi, sum má gerast í Skúgvi, um borast skal úr Skúgvi.

Skúvoyar kommuna greiddi til hoyringina frá, at tey kundu als ikki góðtaka eitt arbeiðsøki, sum er útvið 60.000 fermetrar til støddar, men kundu góðtaka eitt minni arbeiðsøki, sum var eini 10-12.000 fermetrar. Víst varð til hoyringina eisini á, at eitt stórt arbeiðsøki fór at hava ávirkan á landbúnaðarvirksemi í oynni.

Spurningurin um at bora niður úr Skúgvi varð eisini umrøddur, tá landsstýriskvinnan í uttanríkis- og mentamálum var til hoyringar saman við Umhvørvisstovuni. Umhvørvisstovan greiddi frá, at Skúvoyggin er eitt serstakt øki í Føroyum til náttúru og umhvørvi, og er eisini eitt Ramsarøki. Verjan av Ramsarøkjum hevur ikki løgfrøðiligan status, men greitt varð til hoyringina frá, at úr Skúgvi er í 2025 komin umbøn um at seta í verk økisverju fyri Skúvoynna sambært náttúruverndarlógini. Hetta arbeiðið er ígongd, og komið verður á mál við tí arbeiðinum um ársskiftið 2026/2027.

Umhvørvisstovan greiddi til hoyringina eisini frá, at økisverjan fer at fáa ávirkan á, hvussu arbeiðast kann við einum møguligum tunli niður úr Skúvoynni. Greitt varð frá, at økisverjan ikki kann forða fyri Suðuroyartunlinum og atkomutunli til Skúvoyar, men økisverjan kann tó seta avmarkingar fyri, hvussu arbeiðast kann úr Skúgvi, t.d. við avmarkingum um, nær á árinum arbeiðast kann úr Skúgvi, tí atlit skal takast til fugl, sum reiðrast.

Spurningurin um havnargerð og arbeiðspláss í Skúgvi er eisini viðgjørdur í strategisku umhvørvisárinsmetingini. William Simonsen og Olivia Danielsen, lívfrøðingar, greiddu til hoyringina frá, at tað hevði við sær stór inntriv í Skúvoynni, um borað varð úr Skúgvi við havnargerð og stórum arbeiðsplássi í oynni – og talan var um stór inntriv bæði á sjógvi og á landi, og um bæði ljóðdálking og ljósdálking. Greitt varð eisini til hoyringina frá, at tað ikki bar til at endurskapa lendið fult og heilt eftir so stór inntriv. Víst varð á til hoyringina, at loysnin við at bora upp í Skúgvi hevði minni árin á umhvørvið í Skúvoynni.

Spurningurin um at koyra grót á sjógv í samband við møguliga ætlan um fyribils havn í Skúgvi ísbv. Suðuroyartunnilin varð eisini umrøddur við Umhvørvisstovuna. Umhvørvisstovan greiddi til hoyringina frá, at tað ber ikki til at koyra grót á sjógv. P/F Suðuroyartunnilin greiddi eisini frá, at P/F Eystur- og Sandoyartunlar fingu noktandi svar uppá umsókn um at koyra grót á sjógv.

Umhvørvisstovan greiddi eisini til hoyringina frá, at verður gjørd ein havn í Skúgvi, har man brúkar grót úr tunlinum, so krevur tað loyvir, og tað er ikki heppið, um talan verður um havnargerð í serstakari náttúru.

Til hoyringina varð eisini umrøddur spurningurin um fornleivdir í Skúgvi, m.a. í økinum, har Sigmundur Brestisson er grivin. Til hoyringar vístu umboð fyri Skúvoyar kommunu á, at hetta var ikki kannað. Tjóðsavnið vísti til hoyringina á, at tað var sannlíkt, at fornminni í Skúgvi kundu verða ávirkaði av Suðuroyartunlinum, men var trupult at siga, fyrrenn avgerð varð tikin um, hvussu bæði tunnilsmunni og arbeiðsøkir í Skúgvi verða skipaði.

Meirilutin hevur noterað sær, at tað eru fleiri óvissur viðvíkjandi møguleikanum at bora úr Skúgvi. Serliga eru tað náttúru- og umhvørvis viðurskiftini, sum føra við sær óvissur, bæði hvat viðvíkur tí at fáa loyvi at bora úr Skúgvi, og loyvi til at gera stórt byggipláss og fyribils havn í Skúgvi. Harumframt er tað eisini spurningurin um dýrkan av verkætlanini, og at tað er óvissa um, hvørt tað fer at bera til at vinna meirkostnaðin inn aftur við spardari byggitíð, orsakað av óvissum viðv. náttúru- og umhvørvisviðurskiftunum í Skúgvi.

<u>Førleikamenning av føroyskum fyritøkum og føroyskari arbeiðsmegi</u>

Eins og víst varð á í álitinum til LM-072/2024, so mælir meirilutin til, at førleikamenning av føroyskum fyritøkum og føroyskari arbeiðsmegi verður hugsað inn, tá Suðuroyartunnilin verður bjóðaður út.

Meirilutin í nevndini tekur undir við uppskotinum

Meirilutin í nevndini tekur undir við lógaruppskotinum, men mælir til, at:

- Skipanin av vegaføringini í Djúpadali verður gjørd í samstarvi við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni, soleiðis at umhvørvis- og náttúruárinini verða ávirkaði sum minst.
- Skipanin av tunlinum gjøgnum Traðarhamar og vegaføringini eystanfyri Sandsvatn verður gjørd í samstarvi við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni og Sands kommunu.
- Skipanin av vegaføringini í Sandvík og Hvalba verður gjørd í samstarvi við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni og Hvalbiar kommunu.
- Førleikamenning av føroyskum fyritøkum og føroyskari arbeiðsmegi verður hugsað inn, tá Suðuroyartunnilin verður bjóðaður út.

Meirilutin setir fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 3 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Til at leggja upp fyri týðandi náttúruvirðum skulu linjuføringar sbrt. stk. 1, nr. 1, 3 og 5, og staðseting av arbeiðsøkjum og avlopsgróti fyrireikast og prosjekterast í samráð við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni."
Stk. 2 verður eftir hetta stk. 3.

**Viðmerkingar til broytingaruppskotið:**

Víst verður til nevndarskjal I1 og I2, har landsstýriskvinnan í uttanríkis- og mentamálum mælir til at seta ásetingina omanfyri inn í lógina. Hesum tekur meirilutin undir við at broyta.

Landsstýriskvinnan hevur í hesum sambandi víst á, at Umhvørvisstovan viðger í løtuni fleiri mál um økisvernd, har tvey kunnu hugsast at verða ávirkað av verkætlanini um Suðuroyartunnilin:

1. Skúvoy
2. Eitt størri samanhangandi øki kring vøtnini á Sandi, sum sannlíkt fer at fevna um Stóra og Lítla vatn, Sandsvatn, Gróthúsvatn, Søltuvík og Norðara og Heimara hálsavatn.

Aftur at hesum eru sannlíkt áhugaverd djóra- og plantuøkir nær byggilinjunum í Hvalba, hóast einki mál um økisvernd er í gongd.

Tað er lítil ivi um, at ein verkætlan av hesum slag, uttan mun til, hvar hon er staðsett, fer at hava ávirkan á náttúruna í nærumhvørvinum. Tað er týðandi at tryggja, at árinini á serlig náttúruvirðir verða so lítil sum gjørligt.

Til at leggja upp fyri týðandi náttúruvirðum verður sett inn sum nýtt stk. 2 í § 3, at linjuføringar sambært § 3, stk. 1, nr. 1, 3 og 5, og staðseting av arbeiðsøkjum og avlopsgróti skulu fyrireikast og prosjekterast í samráð við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni. Á henda hátt fær Umhvørvisstovan høvi at gera greiðu fyri týðandi náttúruvirðum, og støða kann takast til møguligar tillagingar, har ið tað er fíggjarliga og tøkniliga ráðiligt.

Til at verja náttúrumargfeldið í Føroyum kunnu verndarøki verða skipað við heimild í náttúruverndarlógini. Eitt verndarøki fær eina løgfrøðiliga støðu, sum tryggjar serliga virðismikla náttúru fyri eftirtíðina. Verndarøki eru við til at verja djóra- og plantusløg og náttúrusløg og vistskipanir og kunnu eisini hava týdning fyri útilív og mentanararv.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Hanna Jensen hevur harumframt hesar viðmerkingar:**

Hóast undirritaða eigur lut í felags viðmerkingum meirilutans omanfyri, hevur hon kortini øðrvísi sjónarmið enn hini í meirilutanum víkvíkjandi nøkrum av teimum viðurskiftum, ið eru lýst. Greitt verður nærri frá hesum niðanfyri.

<u>Binda Føroyar saman</u>

Samferðsluútbyggingar hava ígjøgnum tíðirnar verið avgerandi fyri menning og framburð í Føroyum. Ikki minst hevur samanbinding millum oyggjarnar við brúgv, byrgingum og seinastu 25 árini við undirsjóvartunlum havt ómissandi týdning fyri samfelagið, ikki bara í teimum oyggjum, sum beinleiðis eru samanbundnar, men eisini í økjum, sum óbeinleiðis fáa regluliga og fleksibla atgongd til, eitt nú Norðoyggjar, Vágar og Sandoy.

Suðuroyartunnilin er tann størsta samferðsluútbyggingin, sum vit hava umrøtt, ætlað og viðgjørt í Føroyum. Ikki bert er talan um ein dupult so langan undirsjóvartunnil, sum vit nakrantíð hava gjørt, og eisini nógv longri enn nakað annað land higartil hevur gjørt. Men búskaparliga er hetta tann størsta íløgan í heiminum roknað sum kostnaður pr. íbúgva. Hetta í sjálvum sær er orsøkin til, at mong ivast, um Føroyar hava ráð til at fremja hesa verkætlan í verki, ella nær vit hava ráðini til tað. Men í hølunum á hesum ivamálum kemur ivin um, hvussu tað reint praktiskt verkfrøðiliga er møguligt at bora ein so langan undirsjóvartunnil, hvussu er við jarfrøðiligum ivamálum, hvussu við trygd undir bygging m.a. við ventilering, og hvussu við trygd eftir at tunnilin er tikin í nýtslu, o.s.fr.

Framsókn hevur verið partur av politiska fylgibólkinum í arbeiðinum hjá løgmanni við verkætlanini Suðuroyartunnil og hevur í samgonguskjalinum tikið undir við at "*Føroyar skulu bindast saman, soleiðis at vit kunna búgva, virka, arbeiða og ferðast í øllum landinum undir javnbjóðis treytum [...]*" og at "*Heimild verður givin Pf. Suðuroyartunlinum at gera allar neyðugar kanningar í sambandi við Suðuroyartunnilin, og neyðugur peningur verður játtaður.*" Fyriliggjandi lógaruppskot er úrslit av hesum arbeiði.

Í ljósinum frá hesum ymsu sjónarhornum og semjum hevur undirritaða hesar viðmerkingar til ymiskar tættir í verkætlanini.

Náttúruatlit

Viðgerðin hevur enn einaferð staðfest, at Sandoyggin er serstøk á nógvan hátt viðvíkjandi vøtnum, mýrulendi, fuglalívi, sjósílastovni o.ø. Farleiðin í Sandoynni í fyriliggjandi lógaruppskoti fer í gjøgnum og framvið fleiri av hesum økjum og krevur tí ómetaliga nógvar serligar loysnir fyri at tálma inntrivini sum mest.

Alternativa leiðin (norðan fyri Múlan) fer ikki í sama mun ígjøgnum slík øki og er tí ein loysn í so máta. Víst hevur verið á, at hon tó liggur og arbeiðir tætt við Sandsvatn vestaru megin og lutfalsliga tætt við Gróthúsvatn, og til tað er at siga, at um alternativa leiðin einaferð skuldi endað við at verið vald, so verður neyðugt at fyrireika og prosjektera soleiðis, at vandin fyri at dálka hesi vøtn, skal minkast so nógv sum yvirhøvur møguligt.

Fyriliggjandi lógaruppskot við uppskoti til broytingaruppskot frá landsstýrinum um, at linjuføringar og staðseting av arbeiðsøkjum og avlopsgróti skulu fyrireikast og prosjekterast í samráð við náttúrufyrisitingina á Umhvørvisstovuni, er tað, sum politiska semjan hevur ført til.

Linjuføringin

Undirritaða er ígjøgnum viðgerðina vorðin rættiliga sannførd um, at sokallaða alternativa linjuføringin, har undirsjóvartunnilin byrjar norðan fyri Sands bygd, norðan fyri Múlan, er ein góð og møgulig linjuføring, logiskt, búskaparliga og viðvíkjandi varandi náttúruárini. Við henni vildi leiðin suður til Suðuroyar hildið natúrliga fram inni í Traðardali, lutfalsliga stutt frá tunnilsmunnanum til Sandoyartunnilin, uttan eyka kilometrar á landsvegi eysturum á Sandoynni og um Sands bygd til Djúpadals, og uttan at fara ígjøgnum hvørki Sandafløtt, ella gjøgnum nýggja vega- og tunnilsleið eystanfyri Sandsvatn og í Traðarhamri. Upp í hetta hoyrir, at ein loysn, sum var frammi fyri ári síðani, var at fara upp í hæddirnar á Traðarhamri, fyri at spara Sands bygd fyri gjøgnumkoyrandi ferðslu, sum eisini hevur verið ein kannað loysn. Heldur enn at arbeiða víðari við møguleikanum at flyta undirsjóvartunnilin vesturum, so at hann byrjar í Traðardali. Tí ferðsla ígjøgnum Sands bygd og Sandafløtt eru eym evni, sum tí eru viðgjørd hareftir.

Longdin á tí ætlaða undirsjóvartunlinum úr Djúpadali til Sandvíkar er 22,8 km sambært forprosjektinum, og tí nógv longri enn nakar annar undirsjóvartunnil. Hann er longu uttanfyri kategori, og ein partur av viðgerðini í nevndini hevur snúð seg um, hvussu tað kann vera trygt at bora og arbeiða inni við stuffin, viðvíkjandi ventilering og viðvíkjandi tíð og hátti at evakuera, um neyðugt. Undir viðgerðini er ikki afturvíst, at til ber at leingja hendan longu langa teinin inn til stuffin við umleið 3 km, um farið verður í holt við alternativu leiðina, sum er uml. 26 km, um hann byrjar í Traðardali norðan fyri Múlan. Hoyringarpartar hava víst á, at útgerð er tøk til at ventilera heilt upp í 13 km inn í tunnilin, sum kann metast at fara at vera longsti teinur inn til stuff í alternativu leiðini, um so er, at tunnilsarmurin til Skúvoyar ikki kann vera partur av trygdarætlanini undir bygging.

Undir drúgvu fyrireikingunum og ymsu viðgerðunum er undirtøka ikki fingin fyri at broyta politisku semjuna um sjálva linjuføringina, sum fyriliggjandi lógaruppskot er úrslit av.

Trygd í tunlinum

Nógvir spurningar viðvíkjandi trygd, tá tunnilin er tikin í nýtslu, eru viðgjørdir. Hví er eingin trygdartunnil við síðuna av, hví er ikki ein trygdargeiri, eins og í norska T12,5 standardinum, hví

verður mælt til trygdarrúm, tá tað ikki er sambært norskum og ES standardum, hvørjum trygdarstigi verður arbeitt við? Hví ikki ein T10,5 heldur enn T9,5 tunnil? Og svarini hava verið grundað á prís, ferðslumetingar og trygdarprinsipp eins og, at endaligar loysnir ikki enn eru prosjekteraðar, og endalig svar tí einans koma til fleiri av trygdarspurningunum, tá liðugt er at prosjektera.

Undirritaða leggur dent á, at eingin ivi má vera um trygdina í tunlinum undir bygging, eins og sipað er til omanfyri, og eftir at hann er tikin í nýtslu, til eina møguliga politiska støðutakan í framtíðar landsstýri, í tingviðgerð og til atkvøðugreiðslu um at byrja at bora Suðuroyartunnilin, eftir at hann er prosjekteraður og boðin út. Er ivi tá, so eigur politiska skipanin at hava rygg til at krevja neyvari lýsingar, betri kanningar og møguligar uppraðfestingar av trygd, áðrenn Løgtingið skal taka støðu til eitt lógaruppskot um endaligt at fara í holt við at bora Suðuroyartunnilin.

Myndugleikagóðkenningar

Nógv betri greiða má fáast á, hvussu samskiftið og samstarvið millum Landsverk og P/F Suðuroyartunnilin skal ganga nú frameftir, tá prosjekteringin skal fara í gongd. Tí tað er ein fortreyt fyri, um verkætlanin verður nóg væl lýst, granskað og tryggjað til víðari støðutakan. Tað áliggur politikarum, sum til eina og hvørja tíð varða av Landsverki og P/F Suðuroyartunlinum at tryggja, at eingin hugsandi forðing er fyri, at samstarv og samskifti um hetta álvarsmál kann havast á góðum grundarlagi.

Harumframt má tað vera greitt, at Umhvørvisstovan og undir hesum náttúruverndarfelagsskapir veruliga fáa ávirkan á, hvørjar vegaloysnir og aðrar loysnir verða valdar m.a. eystanfyri Sandsvatn fyri at minka um árinið á fuglalívið, sjósílastovnin og lendið, eins og í økinum við Stóravatn, ígjøgnum mýrulendi, landbúnaðarjørð og aðra serstaka náttúru allastaðni á leiðini, har sum Suðuroyartunnilin við avleiddum verkætlanum fer ígjøgnum.

Undirritaða heldur, at tað er ikki afturvíst, at við alternativu farleiðini frá Traðardali slepst undan flestøllum náttúruárini á Sandoynna. Tí átti tann farleiðin at verið kannað munandi meira enn higartil. Og undirritaða heldur, at tað fer einki av fyriliggjandi verkætlan, av ábyrgdarfólki rundan um hana, um tað verður gjørt, hóast tað ikki er ásett í lógaruppskotinum. Tað er í fyrireikingarfasunum á verkætlanum, at flestu óvissur og feilir kunnu verða funnin, so bæði tíð, opið sinni og opinleiki kunnu gera stóran mun og vera munurin millum eina verkætlan, sum heldur seg innanfyri karmarnar og so eina, sum fer av sporinum.

Eysturum sandsvatn og møguligur tunnil í Traðarhamri

Hesin parturin av verkætlanini er tann minst lidni og minst kannaði parturin. Tað er tó eingin ivi um, at ein tunnil ígjøgnum Traðarhamar er ein dýrkandi partur av samlaðu verkætlanini. Hetta kann undra, tá sagt hevur verið frá byrjan, at neyðugt var at halda allan eyka kostnað niðri, tí verkætlanin er so stór og dýr frammanundan. Hetta hevur serliga verið ført fram í mun til fyrst at yvirhøvur gera ein atkomutunnil til Skúvoyar, síðani í mun til at gera alternativu farleiðina, sum hevur ein dýrari undirsjóvartunnil vegna longd, men ikki hevur eyka vegaloysnir í Sandoynni. Síðani eisini í mun til at bora úr Skúvoy, t.e. tær útreiðslur, sum standast av at gera havn, byggipláss, goymslu og at skipa fyri flutningi av gróti o.ø.

Loysnin við alternativu leiðini loysir flestu langtíðar ferðslu- og náttúruárin, men við nýggjasta partinum av fyriliggjandi verkætlan, vegagerð og møguligum tunli eystanfyri Sandsvatn og gjøgnum

Traðarhamar hevur fyriliggjandi verkætlan nógvar størri og smærri eykakostnaðir við sær fyri at leiða ferðsluna um Sandoynna, uttan at hon kemur inn í Sandsbygd. Eisini tá vegir skulu prosjekterast uttan um IBA-øki, mýrulendi, landbúnaðarjørð, byggilendi ella upp um løkir, áir o.a. eru eyka kostnaðir, men neyðugt er júst at koma uttan um so nógv sum møguligt.

Undirritaða heldur, at tað hevur týdning at viðurkenna, at munurin á kostnaði fyri hesar báðar umrøddu linjuføringar nú valla er stórur, og kanska vildi alternativa leiðin undir onkrum fortreytum verið eitt vet bíligari, nú hendan nýggja leiðin eysturum Sandsvatn við tunli nóg longum til at koma neyðuga langt uttan um bygdina, byggilendi, mýrulendi, IBA-øki, landbúnaðarjørð, løkir, áir o.a. er komin í ætlanina.

<u>Sands bygd og kommunurnar annars, sum farleiðin fer ígjøgnum</u>

Tað er sera trupult hjá bygdum og kommunum, tá landsvegur skal ígjøgnum tær, ella tá ferðslutrýstið væntast at hækka munandi. Hetta er væl kent kring landið. Tí hevur tað stóran týdning, at vegaføringin í Sands kommunu ísbv. verkætlanina Suðuroyartunnil verður fyrireikað í tøttum samstarvi við Sands bygdaráð.

Umframt tað, sum er sagt um Sands kommunu, so vil undirritaða leggja dent á, at nógv meira samskifti eigur at vera við Húsavíkar kommunu um tilbúgvingarspurningin og um lendi til at tyrva grót, sum møguliga samstundis kann vera til gagns sum lendi í býarplanlegging kommununnar. Sama er at siga um Hvalbiar kommunu. Tað er av alstórum týdningi at styrkja samskiftið við kommununa munandi, so at allar vegaloysnir verða gjørdar í samstarvi, og at góðar loysnir verða funnar til tunnilsgrótið, um so er, tað ikki kemur til nýtslu beinanvegin. Náttúruvernd má eisini hava høga raðfesting í hesum samskifti í Suðuroy, og verndarátøk gerast, so hvørt farast skal ígjøgnum serstøk øki, men eisini tá farast skal ígjøgnum landbúnaðarøki, sum vit mugu ansa eftir ikki at missa ov nógv av.

<u>Skúvoy</u>

Undiritaða heldur tað vera av stórum týdningi, at atkoma verður til Skúvoyar, nú Suðuroyartunnil skal fyrireikast. Hendan atkoma eigur ikki at vera ein brøtt long brekka, tí tað er ikki fremjandi fyri trygd og ei heldur fyri hóvliga ferðslu. Heldur eigur at verða arbeitt við einum flatari og hóskandi breiðum tunli, sum heldur seg til vanligt tilmælt veghall, og sum kann geva eitt munandi íkast til trygd í Suðuroyartunlinum, bæði undir bygging, og tá tunnilin er tikin í nýtslu.

Undir viðgerðini er vorðið greitt, at møguleikar eru fyri at betra samlaðu farleiðina við at arbeiða við møguleikunum fyri at bora úr Skúvoy. Fyri undirritaðu sýnist tann parturin av málinum at vera tann mest spennandi, tí um rætta loysnin finst fyri havnarbygging, arbeiðsplássi, grótflutningi og goymslu, og um náttúrufyrisitingin gevur góðkenning til at arbeiða úr Skúvoy, tá nevndu loysnir eru kannaðar, fyrireikaðar og prosjekteraðar, so gevur tað fleiri eyka møguleikar í samlaðu verkætlanini, og tað kann merkja styttri byggitíð vegna at borast kann við fýra tunnilsben, hækkaða trygd, betri atkomuviðurskifti og møguleikar fyri Skúvoy, bæði íbúgvar og vitjandi.

Undirritaða leggur dent á, at nærum øll ráðgeving peikar á, at tað einasta rætta er at arbeiða munandi meira við Skúvoy sum partur av verkætlanini Suðuroyartunnil, av omanfyri nevndu orsøkum, áðrenn útboð verður.

Virksemi til føroyskar fyritøkur og førleikamenning av føroyskari arbeiðsmegi

Nevndin hevur viðgjørt spurningin um, hvussu føroysk arbeiðsmegi í størstan mun kann vera partur av verkætlanini, og hvussu førleikamenning av føroyskari arbeiðsmegi kann tryggjast í sambandi við, at Suðuroyartunnilin verður gjørdur. Talan er um størstu verkætlan í Føroya søgu, og tá verkætlanir av hesari stødd verða gjørdar, so eigur tað at vera ein natúrligur partur, at tað tilvitað verður hugsað um virksemi til føroyskar fyritøkur og um at førleikamenna føroyska arbeiðsmegi.

Undir viðgerðini seinasta vár og í vetur er greitt komið fram, at føroyskar fyritøkur eru førar fyri at loysa flestallar uppgávur í sambandi við Suðuroyartunnilin. Tað hevur eisini stóran týdning fyri møguleikan at draga útbúnar føroyingar aftur í størv í Føroyum, at føroyska vinnan sleppur upp í part, tá stórar spennandi verkætlanir, sum m.a. Suðuroyartunnilin, verða gjørdar.

Undirritaða mælir til, at virksemi til føroyskar fyritøkur eins og førleikamenning av føroyskari arbeiðsmegi verður hugsað inn, tá Suðuroyartunnilin verður bjóðaður út.

Fíggjarligi parturin

Fíggjarligi parturin hevur verið viðgjørdur í nevndini. Viðgerðin hevur m.a. fevnt um gjøgnumgongd av uppskotinum til fíggingarleist, sum er í lógaruppskotinum. Harumframt hevur nevndin eisini umrøtt fíggjarliga partin saman við Landsbankanum, Búskaparráðnum og øðrum fakfólkum á økinum. Eisini er kost-nyttu greiningin hjá Landsverki umrødd.

Nevndin hevur noterað sær, at Landsbankin hevur víst á, at tað í verandi støðu hevði verið rættast politiskt at raðfest onnur økir enn Suðuroyartunnilin, m.a. almannaøkið og eldraøkið.

Undirritaða heldur, at tað er sera týdningarmikið at hava fyri eyga og endurtaka, at Suðuroyartunnilin er størsta einstaka verkætlan, sum Føroyar nakrantíð eru farnar í holt við, og tí er tað ein sjálvsøgd fortreyt fyri verkætlanini, at politisk semja er um, hvussu haldførisavbjóðingin skal loysast, undir hesum at neyðugar tillagingar verða gjørdar í løguætlan, raðfestingum og rakstri. Haldførisfremjandi átøk eru neyðug óansæð, og tað er eyðsæð, at til ber ikki at leggja so stóra verkætlan omaná verandi avbjóðingar.

Enn eru óvissur kring fíggjarliga partin, tí samlaði kostnaðurin av verkætlanini verður ikki kendur, fyrr enn tilboðini uppá Suðuroyartunnilin eru komin inn. Og tað skal enn einaferð verða staðfest her, at undirritaða við at taka undir við at seta í gongd prosjektering og eftir tað útboð á ongan hátt er bundin at taka undir við endaligu verkætlanini. Alt veldst um kostnað, lánstreytir, undir hesum hvussu váðin í so krevjandi verkætlan verður býttur ímillum sáttmálapartarnar, og eisini um, nær ætlanin er at seta arbeiðið í gongd. Og tað veldst í tí sambandinum eisini um, hvørt valdar trygdarloysnir kunnu metast at vera nøktandi, um náttúruárin av valdu loysnini ikki fara út um tað, sum er ráðiligt, og um loysnin við atkomutunli til Skúvoyar er nøktandi.

**Ein minniluti** (Beinir Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Í áratíggjur hevur politiska skipanin í Føroyum raðfest at útbyggja okkara samferðslukervi við at knýta oyggjar saman, og harvið eisini knýtt okkara samfelag tættari saman. Hetta hevur verið ein av bulunum undir, at vit í dag hava tað samfelagið, ið vit hava, við øllum tí virksemi og møguleikum, ið tað hevur at bjóða. Tí hava hetta verið væl útgivnir pengar.

Vit hava sæð, hvussu m.a. undirsjóvartunlarnir hava skapt nýggjar møguleikar fyri borgarar í landinum innan familjulív, arbeiðsmarknað, bústaðarøkið, vinnulív v.m.

Í dag eru 91% av føroyingum knýttir saman við føstum vegasambandi. Við einum møguligum Suðuroyartunli verða 99% av fólkinum í Føroyum knýtt saman við føstum vegasambandi. Hesin minnilutin er av tí sannføring, at ein møguligur Suðuroyartunnil hevði verið til stórt gagn, ikki bara fyri Suðuroynna, men allar Føroyar. Fyri Suðuroynna hevur tað avgerandi týdning fyri framtíðina hjá oynni at fáa fast samband.

Hetta uppskot snýr seg um at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanina Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum. Tá hetta er gjørt, kennir man prísin, og tí eisini um verkætlanin er gjørlig fíggjarligt. Hetta er tí ikki eitt uppskot um at fremja verkætlanina, tí tann støðutakanin verður, tá verkætlanin hevur verið í útboði.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt nógvar hoyringar við ymsar partar fyri at lýsa málið so væl sum gjørligt. Í álitinum hjá meirilutanum er greitt frá nógvum av tí, ið er komið fram undir teimum hoyringunum, og skal hesin minnilutin ikki fara at endurgeva alt hetta. Tó eru tað nøkur viðurskiftir, ið komast skal inná.

<u>Trygd</u>

Trygdarspurningurin hevur fylt nógv í viðgerðini, eins og tað hevur gjørt í almenna rúminum, og tað av røttum. Trygdin skal sjálvsagt vera í lagi, bæði undir verkætlanini og tá verkætlanin er latin upp fyri ferðslu.

Tað er torført hjá leikfólkum at meta um, hvat er tað rætta í mun til trygd í tílíkari verkætlan. Serliga tí hendan verkætlan er serstøk, tí talan er um ein rættiliga langan tunnil, men eisini ein tunnil, ið ikki hevur nógva ferðslu, og tí ikki heilt kann samanberast við aðrar.

Í § 4 í uppskotinum er greitt ásett, at Landsverk skal góðkenna verkætlanina, áðrenn arbeiðini verða boðin út, og tá arbeiðini eru liðug. Í hoyringarskrivum hevur Landsverk víst á, at tað eru manglar, og hevur stovnurin ei heldur fingið til vegar alt tað tilfar, ið tey skulu byggja sínar metingar á, og at váðametingin ikki er gjørd av óheftum parti, men verður tað í síðsta enda Landsverk, ið fer at avgera, hvørji krøv verkætlanin skal uppfylla.

Í lógaruppskotinum verður m.a. gjørt greitt, at:

- Verkætlanin skal góðkennast av Landsverki, áðrenn prosjektering og útbjóðing verður framd.
- Landsverk skal gjøgnum hvørja fasu í prosjekteringunum hava tilfarið frá P/F Suðuroyartunlinum til góðkenningar.
- Møguligar broytingar, ið verða framdar undir fyrireiking og prosjektering, verða góðkendar av Landsverki, áðrenn verkætlanin verður bjóðað út.
- Og at frávik frá normum og standardum skulu góðkennast av Landsverki.

Júst hetta við frávikum hevur fylt í viðgerðini, tá tað kemur til eitt nú trygdarrúm, tunnil til Skúvoyar við 10% halli og longd á tunlinum.

Umhvørvisatlit

Tá farast skal undir útbyggingar av okkara samferðslukervi er tað ein sannroynd, at tað ikki slepst undan at gera inntriv í náttúruna. Hesin partur hevur fylt nógv í kjakinum, serliga í teimum lokaløkjum, har ferðslan frá Suðuroyartunlinum skal ganga. Hesin minnilutin mælir til, at tunnilsfelagið í sínum fyrireikingararbeiði er í tøttum samskifti við avvarðandi kommunur – Sands, Húsavíkar og Hvalbiar kommunu – um at finna loysnir, tá skipanin av vegaføringunum í teimum kommunum skal kortleggjast.

Føroyskar fyritøkur og arbeiðsmegi

Hetta er størsta verkætlan í Føroya søgu, og eisini ein verkætlan, ið er samansett av fleiri avleiddum verkætlanum til sjálva høvuðsverkætlanina, Suðuroyartunnilin. Við tí, at tann verkætlanin er ein risastór verkætlan, so er tað avmarkað, hvussu nógvar føroyskar fyritøkur seta seg førar fyri at vera við í tí verkætlanini. Tí mælir hesin minnilutin til, at samlaða verkætlanin verður - har tað ber til - boðin út í pørtum, so føroyskar fyritøkur og arbeiðsmegi kunnu fáa lut í verkætlanini. Hetta gevur eisini føroyskari vinnu og arbeiðsmegi fleiri førleikar og royndir, ið er til frama fyri føroyska samfelagið.

Sum sagt, so snýr hetta uppskot seg um at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanina Suðuroyartunnilin. Hesin minnilutin heldur, at tað er rætt gera. Vit eiga at fáa greiðu á, hvat hendan verkætlan fer at kosta, og tí eisini, um gjørligt er at halda á við henni.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Ein annar minniluti** (Magnus Rasmussen) hevur hesar viðmerkingar:

Hesin minnilutin er fult greiður yvir stóru avbjóðingarnar og ta skeivu gongdina, sum Suðuroyggin hevur drigist við í mong ár. Eingi tekin eru í sól og mána, at henda skeiva gongd fer at venda, og skal gongdin venda, so má ein Suðuroyartunnil byggjast.

Hesin minnilutin er tí av tí áskoðan, at neyðugt er at byggja ein Suðuroyartunnil og harvið knýta føroyska samfelagið enn meiri saman við føstum sambandi.

Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at samtykkja, at farast skal víðari við ætlanini at byggja Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

Við uppskotinum verður tó ikki endaliga samtykt at fremja verkætlanina. Hetta verður avgjørt seinni við eini serstakari løgtingslóg, eftir at verkætlanin er liðug fyrireikað, prosjekterað, boðin út, og at tilboðini eru innkomin, og neyvari greiða er fingin á, hvør kostnaðurin gerst av tunlinum.

Jarðfrøðin

Jarðfeingi hevur gjørt nógvar kanningar, og jarðfrøðin á Djúpadalsfarleiðini er nógv kannað, og nógvar kanningar eru eisini gjørdar til ta sonevndu alternativu farleiðina, sum er norðan fyri Sands bygd.

Til spurning frá Fíggjarnevndini um enn fleiri kanningar, so upplýsir Jarðfeingi, at mælt verður til - í sambandi við Djúpadalsfarleiðina - at gera fýra boringar fram við landsvegnum heima á Sandi og gera mátingar (logga) í holunum. Í tí sambandi verður hugt at jarðfrøðini nærhendis boringunum og væntast tað at taka umleið 3 mánaðir at gera neyðuga arbeiðið.

Til sama spurning viðvíkjandi leiðini norðan fyri Sands bygd, so mælir Jarðfeingi til gera nakrar kanningar á landi og nakrar á sjónum. Leystliga mett, so fer tað at taka millum 4 og 6 mánaðir av effektivari arbeiðstíð at framleiða eina jarðfrøðiliga samlifrágreiðing í stíl við hana, sum er gjørd til Djúpadalsfarleiðina.

So líka mikið, hvør leiðin verður, so verður mælt til, at fleiri jarðfrøðiligar kanningar eiga at gerast, og ein ávísur tíðarmunur hesum viðvíkjandi er millum báðar tunnilsleiðirnar.

Hinvegin, so er upplýst fyri nevndini, at jarðfrøðin ikki gevur nakra ábending um, at báðar leiðirnar ikki væl kunnu brúkast til at bora tunnilin ígjøgnum.

Góðkenning og trygd

Landsverk verður tann myndugleikin, sum skal góðkenna alla verkætlanina frá byrjan til enda, og her er sjálvsagt trygdarspurningurin ein sera, sera avgerandi partur av tí arbeiðinum.

Sbrt. § 4 í lógaruppskotinum og serligu viðmerkingum til hesa, skal Landsverk góðkenna verkætlanina, áðrenn farið verður víðari til sjálva prosjekteringina av verkætlanini og uppgávan hjá Landsverki er eisini at hava eftirlit við, at prosjekteraða verkætlanin er í samsvari við ta góðkenning, sum fyriliggur, áðrenn verkætlanin verður boðin út.

Nevndin hevur fingið upplýst, at søkt verður um fýra undantøk í samband við Suðuroyartunnilin og tey fýra undantøkini eru um:

- Longdina á tunlinum
- Trygdarrúm
- Íbinding/kross í tunlinum
- Hallið upp/niður úr Skúgvi, sum liggur um 10%

Forprosjektið er fyri langari tíð síðani sent Landsverki. Landsverk hevur upplýst fyri nevndini, at tunnilsfelagið hevur í apríl 2025 fingið at vita, at tilfarið, sum er komið Landsverki í hendi, er ikki nøktandi. Víst verður m.a. á, at onkrar tekniskar loysnir eru ikki lýstar, og at váðametingin skal gerast av óheftum parti, og tað er ikki gjørt. Nevndarskjal G1 í málinum er frá Landsverki og ber heitið *Myndugleikaviðgerð av Suðuroyartunlinum,* og har sæst týðiliga og greitt, hvussu

myndugleikaviðgerðin skal skipast og eftir upplýsing í nevndini og í omanfyrinevnda skjali, so er greitt, at nógv manglar í at fáa myndugleikaviðgerðina av Suðuroyartunlinum avgreidda. Og so leingi hetta ikki er avgreitt, so slepst ikki veruliga víðari við verkætlanini.

Heldur ikki er greitt og ikki fæst at vita, hvørt Landsverk fer at góðkenna umsóknina um undantøkini og/ella, hvat møguliga skal broytast fyri at fáa hesa góðkenning, sum er nevnd omanfyri.

Linjuføringar

Í lógaruppskotinum er bert ein farleið nevnd til sjálvan undirsjóvartunnilin, og er tað Djúpadalsfarleiðin.

Ein onnur farleið, sum hevur verið nógv umrødd, men sum ikki er tikin við í verandi lógaruppskot, tað er farleiðin, har undirsjóvartunnilin fer niður norðan fyri Sands bygd, ofta nevnd tann alternativa farleiðin.

Ført hevur verið fram, at hendan linjuføringin fer at skerja útbyggingina av Sands bygd, men tað má vera ein misskiljing. Hendan linjuføringin fer ikki at forða fyri útbyggingini av Sands bygd, sí nevndarskjal H: Framløga av tunnilsloysn.

Fyri eini tíð síðani varð ført fram, at ikki bar til at brúka hesa linjuføringina uttan so, at borast kundi úr Skúvoy. Orsøkin var ventilering, men nú er staðfest, at til ber at ventilera upp til eitt strekki, sum er 13 km langt, og strekkið av Sandi til Skúvoyar er uml. 11 km. T.v.s., at nú er tað ikki ein fortreyt at borast skal úr Skúvoy fyri at brúka hesa linjuføringina.

Eftir nógv skjøl, nógvar hoyringar og viðgerð í Fíggjarnevndini, so er hesin minnilutin av tí sannføring, at henda seinni nevnda farleið er nógv tann betra farleiðin. Hesin minnilutin mælir tí í broytingaruppskoti til, at hetta skal verða farleiðin, sum skal fyrireikast, prosjekterast og bjóðast út, so neyvari kostnaðarmeting fæst av samlaðu verkætlanini.

Orsakirnar til, at hesin minnilutin er komin til ta niðurstøðu, hetta, at altenativa farleiðin er tann betra og tí rætta farleiðin, tær eru nógvar. M.a kann nevnast, at henda farleið:

- Verður styttri – uml. 3,5 km – styttri ferðatíð, størri samfelagsnytta
- Minni hæddarmunur í tunlinum – uml. 80 metrar
- Lægri vegaføring uppi á landi – ikki upp um 20 metrar heldur enn gott 100 metrar eftir fyriliggjandi lógaruppskoti
- Munandi minni hall upp í Skúgvi – økir um trygdina
- Ger munandi minni inntriv í náttúru og umhvørvi – færri tunnilsmunnar og minni vegagerð
- Bíligari (við somu eindarprísum sum Tunnilsfelagið brúkar í sínum útrokningum)
- Góð og smidligari loysn við grótinum – brúkast til ídnaðarøki í Skopun og/ella Gomlurætt

Hesir nevndu fyrimunir vísa eisini greitt, at tann alternativa farleiðin er avgjørt besta loysnin til undirsjóvartunnil til Suðuroyar.

Hesin minnilutin er av tí áskoðan, at vit sum Løgting hava skyldu at fyrireika og prosjektera ta bestu linjuføringina, sum eisini gevur ta bestu samfelagsnyttuna. Hetta er tann alternativa farleiðin og tað er tí henni, vit eiga at fara eftir – hvørki meiri ella minni. Tí verður broytingaruppskot hesum viðvíkjandi lagt fram.

Fíggingarleistur

Hesin minnilutin er væl vitandi um, at við samtykt av hesum lógaruppskoti, so verður ikki endalig avgerð tikin um at fremja suðuroyartunnilsverkætlanina. Tó eiga vit so avgjørt at fyrireika fíggingina av hesi risastóru verkætlan so væl sum tilber og tað longu nú.

Kostnaðurin fyri verkætlanina verður mettur at liggja um tær fimm milliardir krónurnar, men vit vita hetta ikki ágreiniliga, fyrr enn prosjekteringin er liðug, útboð hevur verið og tilboð eru innkomin. Eitt er tó vist, og tað er, at hetta snýr seg um eina upphædd upp á nakrar milliardir krónur. Vit hava skyldu til at fáa eina so trygga, góða og bíliga fígging, sum tilber – tað kann eingin ivast í, at tað er bæði sjálvsagt og rætt. Vit mega eisini út um landoddarnar fyri at fáa neyðuga fígging til verkætlanina, og tíðin fer at vísa, hvussu áhugin er fyri at fíggja ella vera við til at fíggja hesa verkætlan.

Vit hava skyldu til at fáa allarbestu fígging, og tí mugu allir møguleikar troytast og eingin útilokast. Allir hugsandi møguleikar fyri fígging eiga at verða kannaðir væl og virðiliga, og so eiga vit at taka av tí besta og tryggasta láninum, sum vit kunnu fáa. Alt annað er ábyrgdarleyst.

Við hesum viðmerkingum setir hesin minnilutin fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

§ 3, stk. 1, nr. 1-2 verða orðað soleiðis:
"1) Farleið frá verandi vegi í Traðardali til undirsjóvartunnilin norðan fyri Sands bygd,
2) undirsjóvartunnil við koyribreyt suður og norður í sama bergholi frá norðan fyri Sands bygd til Sandvíkar, við atknýttum atkomutunli frá Suðuroyartunlinum til Skúvoyar,"

**Viðmerkingar til broytingaruppskotið:**

Við hesi broyting verður linjuføringin broytt soleiðis, at undirsjóvartunnilsmunnin verður norðan fyri Sands bygd ístaðinfyri Djúpadal, og farið verður sostatt beina leið frá verandi vegi í Traðardali niður í undirsjóvartunnilin norðan fyri Sands bygd.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur hesin hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Ein triði minniluti** (Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Hava vit ráð til ein Suðuroyartunnil?

Tað verður ferð eftir ferð sagt, eitt nú av Landsbankanum, at vit ikki hava ráð til ein Suðuroyartunnil. Líknandi útsagnir vóru eisini at hoyra, tá støða skuldi takast til Vágatunnilin, sum var ein minst líka "ør" verkætlan tá fyri góðum 20 árum síðani, sum tó ongin av okkum vildi verið fyriuttan í dag. Eftirfylgjandi eru fleiri undirsjóvartunlar gjørdir. Spurningurin um at hava ráð kann eisini vendast á høvdið, tí hava vit ráð at lata Smyril sigla við hesum stóra undirskotinum í rakstrinum?

Tað er rætt, at Suðuroyartunnilin er ein stór íløga, men í síðsta enda er tað ein spurningur um, hvussu vit raðfesta á okkara løguætlan. Also, vilja vit rúma einum Suðuroyartunli á løguætlanini ella ikki.

Her má leggjast afturat, at uppskotið sum vit viðgera nú, snýr seg um linjuføring, prosjektering og útboð. Endalig støða verður ikki tikin til íløguna, fyrr enn hesi viðurskifti eru avgreidd við enn einum lógaruppskoti, sum eitt komandi Løgting skal taka støðu til.

Við teimum tølum, sum eru løgd fram fyri Fíggjarnevndina og almenningin, so heldur hesin minnilutin, at Suðuroyartunnilin er ein skilagóð íløga, um prísmetingarnar bert halda nøkulunda. Um prísirnir vísa seg at vera nógv hægri, tá ið tilboðini koma inn, so er støðan ein onnur.

Eisini hevur verið víst á tær negativu kost-nyttu greiningarnar fyri Suðuroyartunnilin. Um vit altíð skulu fylgja teimum rættiliga smølu kost-nyttu greiningunum, so kann, strangt tikið, ongin íløga gerast uttan fyri miðstaðarøkið.

Um Suðuroyggin skal hava lív lagað, so er neyðugt, at hon verður knýtt uppí meginlandið. Hesum fáa allar Føroyar eisini stóra nyttu av.

Hesin minnilutin vil gera vart við, at ansast skal eftir ikki at gera tær avleiddu verkætlanirnar ov dýrar, tí hetta kann í síðsta enda kvala sjálvan Suðuroyartunnilin. Eitt nú er upplýst fyri nevndini, at tað kostar góðar 200 mió. kr. at minka hallið í atkomutunlinum til Skúvoyar frá 10% til 5%. Eisini er upplýst, at tað kostar einar 130-160 mió. kr. at leingja ætlaða tunnilin undir Traðarhamri, soleiðis at ferðslan kann leiðast norður um Meginskúlan. Í Hvalba hava summi nevnt eina lokarennu sum ein møguleika, men hetta er ein ótrúliga dýr loysn sambært tølum frá P/F Suðuroyartunlinum. Sambært teimum kostar ein lokarenna 300-400 mió. kr. fyri hvønn kilometur. Umframt hetta eru onnur viðurskifti, sum eisini kunnu dýrka samlaðu verkætlanina.

Linjuføring

Stóra ósemjan tykist at vera um, hvørt linjuføringin skal ganga úr Djúpadali norðan fyri Skarvanes ella frá Múlanum norðan fyri Sands bygd. Hesin minnilutin er av tí fatan, at P/F Suðuroyartunnilin, við sínari fakligheit og royndum av hinum undirsjóvartunlunum, hevur valt eina skilagóða linjuføring, sum gongur úr Djúpadali og suður til Sandvíkar, við einum tunnilsarmi upp til Skúvoyar.

Tunnilsáhugabólkurin vísir eisini á eina áhugaverda linjuføring, sum alternativ til ta hjá P/F Suðuroyartunlinum. Tó má staðfestast, at orðaskiftið um og samanbering av hesum báðum er út frá tveimum fullkomiliga ymiskum útgangsstøðum. Tann hjá P/F Suðuroyartunlinum verður kritiserað niður í smálutir, meðan viðgerðin av alternativu linjuføringini er á einum meiri yvirskipaðum støði enn.

Hesin minnilutin heldur, at viðgerðin er farin í so nógvar smálutir nú, at tað tykist sum, at Løgtingið er við at yvirtaka arbeiðið, sum tunnilsfelagið annars vildi gjørt, eftir at lógin er samtykt, eins og tað bleiv gjørt í øllum hinum undirsjóvartunlunum. Hesin minnilutin metir tað vera neyðugt, at Løgtingið lyftir seg upp aftur úr smálutunum og tekur støðu til høvuðsspurningarnar í hesum uppskotinum:

- Skulu vit fyrireika ein Suðuroyartunnil?

- Um ja, skulu vit so fyrireika linjuføringina til Múlan norðan fyri Sands bygd ella til Djúpadals norðan fyri Skarvanes?

Hesin minnilutin metir, at linjuføringin eystanfyri til Djúpadals er tann skilabesta. Yvirskipað kann sigast, at hetta er linjan, sum passar best til fíggjarliga partin og trygdina, meðan jarðfrøðin eisini sær góð út. Ikki minst er undirstrikað, hvussu umráðandi tað er at raðfesta trygdina, ímeðan sjálv verkætlanin verður framd. Tess styttri tunnilin er, tess tryggari er verkætlanin.

Leiðin til Múlan hevur eina størri nyttu fyri brúkaran, tá ið tunnilin verður tikin í brúk, við tað at samlaða farleiðin verður styttri. Hetta er ein av høvuðsgrundgevingunum hjá tunnilsáhugabólkinum. Men her fylgja størri óvissur við, tá sjálv verkætlanin skal fremjast.

Tað skal sjálvandi takast hædd fyri náttúruni, so væl sum tað nú einaferð ber til, men hoyringarpartarnir hava verið ymiskir á máli um, hvør farleið er betri fyri náttúruna.

<u>Løgmaður</u>

Her at enda má tó undirstrikast, at hesin minnilutin, sum partur av Miðflokkinum, als ikki góðtekur framferðina hjá løgmanni í vetur.

Aksel V. Johannesen, løgmaður, hevur við allari sínari politisku megi kroyst ræðuleikans uppskot ígjøgnum Løgtingið, og sum løgmaður hevur hann undirgrivið okkara stýrisskipanarlóg, við at koyra landsstýrisfólk frá og seta tey aftur sama dag, fyri at fáa eina politiska kabal at ganga upp.

Við at svíkja tann veikasta samfelagsbólkin vit hava í Føroyum, hevur Aksel V. Johannesen ikki víst seg at vera løgmaður fyri allar føroyingar.

Tað hevur tí lívsneyðugan týdning, at eitt stjórnarskifti fer fram sum skjótast, soleiðis at henda gerð kann strikast.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin støðu í tingsalinum.

**Fíggjarnevndin, 19. februar 2026**

| | | |
|---|---|---|
| Eyðgunn Samuelsen<br>forkvinna | Beinir Johannesen<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Dennis Holm | Hanna Jensen | Magnus Rasmussen |
| | Steffan Klein Poulsen | |